# Broytingar í Bussleiðini meðan vegarbeiði er í gerð í R. C. Effersøesgøta




**Steingjan av R. C. Effersøesgøta við SMS**

**Vegna vegabeiði verður R. C. Effersøesgøta, frá Egholmstrøð til Húsagøta, stongd fyri allari ferðslu frá leygardegnum 13.05.2000 kl. 14.00, til mánamorgun 29.05.2000 kl. 06.00.**

**Broyting í Bussleiðini:** ***Leið 1***: Koyrir úr Steinatúni , eftir R. C. Effersøesgøta, Gripsvegi, Hoyvíksvegi og Tjaldursvegi til Gundadalsveg, sum síðani koyrir sum vanligt.

***Leið 2:*** Koyrir úr Hoyvík, eftir Staravegi, Heykavegi, Tjaldursvegi, Hoyvíksvegi og Gripsvegi, sum síðani koyrir sum vanligt.

***Leið 3:*** Koyrir úr Steinatúni, eftir R. C. Effersøesgøta, Gripsvegi, Hoyvíksvegi, Tjaldursvegi og Heykavegi, sum síðani koyrir sum vanligt.

**Øll óneyðug tung ferðsla verður víst til at koyra eftir ringvegnum, meðan R. C. Effersøesgøta er stongd.**

Tórshavnar Kommuna

---

2 ´arin

Leygardagur 13. mai 2000

# Javnvág í søguna

Nú skal leitast eftir skjølum í eystureuropiskum skjalagoymslum. Støðan hjá Føroyum undir kalda krígnum skal lýsast frá báðum síðum.
Lesið á síðu 19



**Tey sjey børnini hjá Malvinu og Nils J. Absalonsen á Viðareiði í kronologiskari røð. Aftanífrá: Sámal Michael, Dánjal, Kristina, Gunnvá, Katrin, Jóhan og lítli beiggi... Mynd: Jens Kristian Vang**



# Sjey børn

Bóndahjúnini í Heimistovu á Viðareiði hava ikki ligið sjóvarfallið av sær, tá ið talan er um at seta arvingar í verðina. Eftir átta árum fingu tey seks børn, og fyri kortum kom eftirnølarin, sum ikki hevur fingið navn enn. – Vit eru í uppisetri við nøvnum, sigur mamman brosandi. Lesið miðsíðurnar